

# „NYTRUR Í HENDI“

– eitt gamalt føroyskt barnaspæl

Í høvdinum á beinfiski eru tvær nytrur, sum fiskurin brúkar at halda javnvágini við. Fyrr í tíðini, tá t.d. toskarhøvd vórðu kókað, lógu nytrurnar ofta eftir í pottinum. Tær plagdu børnini at fáa at spæla við. Helst eru fleiri mátar at spæla um nytrurnar. Niðanfyri er greitt frá einum máta.

*Nytrurnar verða býttar millum børnini, so tey fáa líka nógvar í part. Síðan ræður um at spæla um nytrurnar. Jóna tekur t.d. 4 nytrur í lógvarnar, síðan vendir hon sær til næsta barnið, Biritu, rystir hendurnar og sigur hesa rímuna:*

***Nytrur í hendi***
***hav tú mínar***
***git so mangar***
***tú onga letur***

*Kollgitir Birita, noyðist Jóna at lata Biritu nytrurnar. Gitir Birita 3, skal hon lata Jónu 1 nytru (munin millum gitið og rætta talið).*

*Síðan fær Birita sær t.d. 2 nytrur í lógvarnar, rystir hendurnar og sigur rímuna fyri Leivi ... o.s.fr.*

*Vunnið hevur tann, sum hevur flestar nytrur tá avtornar. Antin tá onkur hevur vunnið allar nytrurnar, ella um frammanundan verður avgjørt at spæld verða t.d. 5 umfør ella 15 minuttir.*

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE